# gera tað vit duga



*Lagt verdur upp til økt samstarv millum føroyskar stovnar, m.a at leggja Menningarstovuna, Vinnuframagrunnin og Ferðaráðið saman*

## Breið semja

Raðfestingarnar eru heldur breiðar, men her skal tó minnast til, at talan er um eitt upplegg til ætlanir komandi 10 árini, sum politisk semja skal verða um. Hugsast kann, at Landstýrið tekur undir við í hesum raðefestingum. Men tað sum endamálið má verða við at gera eina 10 ára ætlan, er at breið politisk semja er, eisini við flokkar uttanfyri samgonguna, soleiðis at alt ikki skal gerast av nýggjum, hvørja ferð nýggj samgonga verður skipað.

## Raðfestingar

Bygnaðarpolitiskt verður raðfest at einskilja, fáa eina dagførda vinnulóggávu, at tryggja rættvísa og burðadygga alivinnu, at seta nevnd at dagføra fiskivinnupolitikkin, við skattareformi at lækka inntøku- og partafelagsskatt, og samstundis breiðka skattagrundarlagið. At hækka út- og eftirútbúgvingarstøðið og styrkja ófaklærd, lata tryggingarmarknaðin upp, bøta um samferðslumøguleikar m.a við at útbýggja flogvøllin, at fáa EBS líknandi skipan og at fáa EFTA limaskap á dagsskrá.

Mikropolitiskt verður raðfest at gera mannagongdir um ráðgeving til íverksetarar. At marknaðarføra føroyskar vørur og tænastur og Føroyar sum íløguland, menna og marknaðarføra Føroyar sum ferðamannaland, stovna granskingarpark, styrkja granskingargrunning og ráð og venturekapital soleiðis at meira tolin og váðafúsur kapitalur verður. At fremja KST ætlanina fyri Føroyar og at styrkja brúkarasamtakið.

## Politikkur er raðfesting

Tað verður altíð ósemja um raðfestingar, men tað er tað politikkur snýr seg um. Tað er gott at síggja, at vinnumálaráðið ger eina slíka framtíðarætlan og vísir á økir, sum skulu betrast. Talan er um eitt gott fyrsta stig á leiðini, um hvat skal broytast. Veruliga avbjóðingin er at fáa gongd á broytingarnar og at gera eina raðfesting við neyvum tíðarætlanum, og at hetta verður gjørt í breiðari poltiskari semju, har eisini andstøðan sleppur upp í part, men har partarnir sum skulu mennast eisini verða tiknir við í tilgongdina.

## Hagtøl

Tað er ein stór frøi at síggja, at týdningurin at hava hagtøl verður virðismettur. Vanliga hugsa vit ikki so nógv um hagtøl, men tey eru alneyðug fyri at kunna meta neyvari um okkara samfelag og harvið betra tað, eins og vit ikki kunnu meta okkum við onnur lond, um vit ikki hava tilfar at brúka til at meta okkum saman við.

## Samstarv

Lagt verdur upp til økt samstarv millum føroyskar stovnar, m.a at leggja Menningarstovuna, Vinnuframagrunnin og Ferðaráðið saman. Tað er helst rætt at leggja fleiri stovnar saman, eisini fyri at fáa betri og breiðari samstarv í almenna geiranum.

## Altjóða styrkin

Ein av rekmáttunum til at mæla til broytingar í hesum sambandi, er alheimsgerðin og altjóðagerðin av Føroyum. Hugsanir eru um hvat vit hava tørv á, t.d. EBS líknandi skipan og marknaðarføring, men ikki hvussu. Skal altjóðagerðin hava fleiri fyrimunir enn vansar fyri Føroyar, er eisini neyðugt at styrkja okkum altjóða. T.d. at altjóða parturin av Menningarstovuni gerst ein partur av uttanríkistænastuni, soleiðis at til ber at samansjóða handilsátøk í dagliga uttanríkispartin, og at størri samband soleiðis er millum tann meira politiska uttanríkispolitikkin og vinnulívið, sum hevur tørvin, og soleiðis ein samansjóðing av førleikunum á hesum øki, sum er altavgerðandi fyri at fáa Føroyar millum vinnarar í altjóðagerðini. Ein partur av altjóðagerð er, at tað ikki longur er eins lætt at skilmarka millum innlendis- og uttanríkispolitikk. Viðurskiftini heima skulu verða í lagi, men tey skulu í nógv størri mun setast í samband við altjóða partin. Hugsast skal ikki um at hava eina umfatandi tunga uttanríkistænastu við nógvum sendistovum, men uttanríkisparturin má styrkjast soleiðis, at tær betringar og tillaðingar, sum gjørdar verða í Føroyum eisini verða brúktar. Um ætlanin er at hyggja 10 ár fram, má ljósið tí eisini varpast á hvussu vit altjóða fáa brúkt teir førleikar við byggja upp, og tí skal eisini hugsast um altjóða partin á øllum økjum, eins og hvussu tað almenna skal ganga á odda fyri tryggja okkum best møguligu sømdirnar.

## Høvuðsmálið

Høvuðsmálið er tí at syrgja fyri at altjóðagerðin fyri Føroyar fær fleiri fyrimunir enn vansar. At byggja upp ein sjálvberandi búskap, sum eisini merkir niðutrapping av blokkstuðlinum. At arbeiða fyri at gera føroyska búskapin til ein marknaðarbúskap og at útbyggja vælferðarsamfelagið. Her koma vit aftur til virðini. Sett er út í kortið, at skatturin skal lækkast og vælferðin útbyggjast, tvey sum oftast mótstríðandi hugtøk, men sum vísir munin á virðinum hjá samgonguflokkunum.

## Broytingar neyðugar

At neyðugt er við broytingum, er lítið at ivast í. Granskingarparturin í Føroyum er serliga lítil og fjølbroytni í búskapinum er ikki stórt. Størsta virði í alheimsgerðini er vitan, og tað eru tøl sum benda á, at vit ikki í nóg stóran mun fáa okkara fólk heimaftur, sum fara út at lesa og her eru fleiri sum meta, at ein av høvuðsorsøkunum er at vinnulívið ikki hevur nóg mikið at bjóða teimum.

Vit fara komandi vikurnar at hyggja nærri at einstøku pørtunum í ætlanin og at fylgja við orðaskiftinum á tingi. Sum heild er tað gott at vit fáa eitt aðalorðaskifti um hetta økið. Samstundis sæst, at talan er um eina politiska ætlan, sum bæði roynir at seta karmar og verða meira konkret á ávísum økjum, men sum hevur valt ikki at seta fokus á broytingar, sum kunnu kosta politiskt, men sum kanska eru neyðugar. Tí er hetta uttan iva eitt politiskt innspark, sum í viðgerðini hevur brúk fyri at fakkunnleikin eisini verður við í viðgerðini og kjakinum, nú grundarsteinarnir fyri framtíðina skulu leggjast.